# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Forðaði løgmálaráðið kanningunum í Blekingegøtumálinum, skal alt kannast av nýggjum*

*Brian Mikkelsen, løgmálaráðharri)*



*Tað seinasta flogfarið fór úr Tempelhof í ghárkvøldið*

*Mynd: AP*

# Søguligur flogvøllur fer í søguna

**Í gjár fór tað seinasta flogfarið á flog av Tempelhof-flogvøllinum í Berlin**

Tempelhof-flogvøllurin bleiv tikin í nýtslu í oktober í 1923 og var tann fyrsti vinnuligi flogvøllurin í heiminum. Tann kendi flogvallarbygningurin bleiv bygdur , eftir at nazistarnir vóru komnir til valdið í Týsklandi. Hann er triðstørsti bygningur í heiminum aftan á Pentagon í Washington og ta risastóru borgina hjá fyrrverandi rumenska einaræðisharranum Nicolae Ceausescu í Bukarest.

Tempelhof-flogvøllurin gjørdist kendur um allan heimin, tá USA, Bretland og Frakland skipaðu fyri teirri kendu loftbrúnni fyri at hjálpa fólkinum í Vesturberlin, tá Sovjetsamveldið stongdi allar farleiðir til býin. Í 11 mánaðir fingu teir 2,5 milliónir íbúgvararnir í Vesturberlin allar sínar nýtsluvørur ígjøgnum luftina, og tað vóru bara 90 sekundir ímillum, at flutningsflogførini settu seg á Tempelhof.

41 bretskir og 31 amerikanskir flogskiparar doyðu av vanlukkum undir tiltakinum, og teimum til heiðurs stendur ein minnisvarði á tí søguliga flogvøllinum, sum nú fer í søguna.



*Barrack Obama er sjey prosentstig framman fyri John McCain*

*Mynd: AP*

# Obama heldur tørn

**Fýra dagar undan forsetavalinum er Barrack Obama sjey prosentstig frammanfyri**

Barrack Obama heldur tørn í valstríðnum upp undir forsetavalið týsdagin. Sambært teirri seinastu meiningakanningini, sum Reuters og Zogby hava latið gera, hevði Obama fingið 50 prosent av atkvøðunum og John McCain 43 prosent, um valið var nú.

Hetta er sama úrslit, sum ein tilsvarandi kanning í gjár vísti.

Tøl hjá Nielsen Media Research vísa, at 33,6 milliónir amerikanarar sóu reklamusendingina, sum bleiv send á teimum trimum sjónvarpsstøðunum CBS, NBC og Fox gjáranáttina. Sendingin vardi ein hálvan tíma og kostaði Obama einar 25 milliónir krónur.

Í gjárkvøldið var Obama aftur á skíggjanum, hesaferð í sendingini „The Daily Show" hjá Jon Stewart. 3,6 milliónir amerikanarar fylgdu við sendingini, og so nógvar hyggjarar hevur sendingin ikki havt fyrr, skrivar AP. Gamla metið var 2,9 milliónir hyggjarar, og tað bleiv sett, tá kona Obama, Michelle, var gestur hjá Jon Stewart.

# Myrdu ósek fólk fyri at fáa viðurkenning

**Í Kolombia hava fleiri leiðandi heryvirmenn fingiðsekkin, eftir at herurin hevur funnið loyniligar hópgravir**



*Generalarnir Luis Roberto Pico Hernandez, José Joaquin Cortes og Paulino Coronado siga seg vera ósekar*

*Mynd: EPA*

Forsetin í Kolombia, Alvaro Uribe, hevur enn eina ferð víst, at hann er ikki bangin fyri at seta seg upp ímóti hervaldinum. Í gjár boðaði hann frá, at tríggir av landsins ovastu generalum og 24 aðrir yvirmenn í stjórnarherinum hava fingið sekkin.

Orsøkin til avgerðina hjá forsetanum er, at myndugleikarnir hava funnið hópgravir við líkunum av 19 ungum monnum, sum hvurvu úr fátækrabýlingunum í høvuðsstaðnum Bogotá. Sambært ákæruvaldinum upplýsti herleiðslan, at teir 19 menninir vóru uppreistrarmenn, og at teir vóru falnir í bardaga við stjórnarherin. Endamálið var at útvega herinum rós og hansara leiðarum viðurkenning, skrivar AP.

Mannarættindafelagsskapir í Kolombia siga, at hermenninir burturfluttu teir ungu menninar, sum fyrst fingu tilboð um arbeiði. Allir 19 vóru av fátækum fólki og teir flestu heimleysir.

Teir tríggir generalarnir hava góðtikið uppsagnirnar, men teir halda uppá, at teir vistu einki.

## STUTT SAGT

### Palin næstu ferð?

Fleiri amerikanskir fjølmiðlar vænta, at tapa John McCain og Sarah Palin valið týsdagin, fara republikanararnir at stilla Sarah Pahlin upp sum forsetavalevni á valinum um fýra ár.

Sambært fjølmiðlunum er Sarah Palin ein umstríddur persónur innanhýsis í republikanska flokkinum. Tað eru tey, sum halda, at við henni hevur flokkurin fingið ein persón, sum kann endurnýggja uppfatanina av flokkinum, sum ikki hevur verið serliga jalig tey seinastu árini. Onnur halda, at hon hevur skaðað valstríðið hjá McCain, og at flokkurin eigur at fáa hana av pallinum sum skjótast aftan á valið týsdagin.

- Tað er einki at ivast í, at Sarah Palin kann røkka langt, og at hon eisini hevur sett sær tað sum mál. Men spurningurin er, hví og til hvat. Vit vita ikki, hvørt hon hellir til hugmyndafrøðina hjá Bush ella Reagan. Tað tosar hon ikki um. Hon bara.... tosar, skrivaði tann konservativa Paggy Noonan í einari grein í blaðnum Wall Street Journal fyri stuttum.

Aðrir konservativir republikanarar hava bent á sama borðið, teirra millum David Brooks, George Will, Kathleen Parker og David Frum. Hesin seinasti hevur sagt, at Sarah Palin er ivaleyst væl umtókt millum teir trúføstu veljararnar hjá republikanska flokkinum, men at hon útvegar ikki flokkinum aðrar atkvøður.

Men tað eru eisini republikanarar, sum styðja varaforsetavalevnið, teirra millum Richard Viguerie. Í einari blaðgrein nú um dagarnar skrivaði hann, at Sarah Palin hevur givið republikanska flokkinum eitt nýtt andlit, og haraftur at umboðar hon ein landslut og ein stætt, sum vanliga ikki hava verið á ovastu rók í flokkinum. Blaðstjórin á Weekly Standard, Fred Barnes, er eisini hugtikin av Palin.

- Um republikanararnir skilja tað ella ei, so hevur Sarah Palin stóran týdning fyri flokk teirra, og teir gera eitt stórt mistak, um teir lata hana fara í gloymskuna aftan á valið, skrivar hann.